LØGMANSSKRIVSTOVAN

## Starvslesandi í London og Brússel
### (Stagiaire)

Søkt verður eftir lesandi til ávikavist sendistovu Føroya í Bretlandi (London) og sendistovu Føroya í Evropasamveldinum (Brússel). Starvstíðin er frá september 2003 til februar 2004 ella fyri lestrarhálvárið.

**Uppgávur**
Tann starvslesandi verður partur av dagligu arbeiðsgongdini á avvarðandi sendistovu, serliga við atliti at samskifti viðvíkjandi handli og fiskivinnu.

**Førleikakrøv**
Tann starvslesandi eigur at vera lesandi føroyingur við hægri háskúla, sum í minsta lagi hevur útbúgving á *bachelor* stigi.

Umsøkjarar eiga at hava góð samstarvsevni, vera áhitnir, miðvísir, kunna arbeiða sjálvstøðugt og vera til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar. Umsøkjarar eiga harumframt at vera stinnir í føroyskum og enskum máli.

**Starvsstaðið**
Starvsstaðið verður ávikavist Sendistova Føroya í Bretlandi, 55 Sloane Street, London SW1X SR ella Sendistova Føroya í Evropasamveldinum, Rue d'Arlon 69, B-1040 Brussels. Sendistovurnar eru skipanarliga partar av Løgmansskrivstovuni.

**Setanartreytir**
Størvini eru skipað eftir teim reglum, ið eru galdandi fyri starvslesandi á staðnum og er ólønt; men viðbót verður latin eftir nøktandi uppihald. Møguleiki er at søkja um ferðastuðul frá Stuðulsstovninum. Stuðul verður veittur til bústaðarútreiðslur.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Herluf Sigvaldsson, deildarstjóra í uttanríkisdeildini á Løgmansskrivstovuni, tlf. 351010, ella til John Rajani, sendimann í London, tlf. +44 (0)20 7333 0227 ella til Hákun J. Djurhuus, sendimann í Brússel, tlf + 32 (2) 233 08 55.

**Umsóknir**
Umsóknir, prógv, c.v. og viðmæli verða at senda

**Løgmansskrivstovuni**
Tinganesi
FO-100 Tórshavn
Telefax +298 35 10 15    t-postur: info@tinganes.fo

og skulu vera Løgmansskrivstovuni í hendi í seinasta lagi mikudagin 9. apríl 2003.

***Løgmansskrivstovan** er fyrisiting hjá løgmanni. Hon fevnir millum annað um uttanríkistænastuna við uttanríkisdeild og sendistovum í ávikavist Bretlandi, Danmark og Evropasamveldinum og situr fyri málum, ið eru løgd til løgmann sambært stýrisskipan Føroya umframt uttanríkismálum.*

---




SANSIR 355 355

P/f Fiskavirkið sóknast eftir tveimum framleiðsluatstøðingum og tveimum lærlingum.

**Framleiðsluatstøðingar**
Atstøðingarnir, ið vit sóknast eftir, skulu helst hava fiskivinnuútbúgving ella aðra miðnámsútbúgving.

Annar atstøðingurin skal stovna og skráseta framleiðslu, gera innanhýsis skrásetingar, og hava eftirlit við ráfiskamóttøku.

Hin atstøðingurin skal arbeiða við innanhýsis eftirliti, arbeiða við úrtøkuskráseting og gera royndir.

Báðir atstøðingarnir fara at starvast saman við formonnum og fólki í framleiðsluni. Dentur verður lagdur á leiðsluppgávur. Løn sambært avtalu.

**Lærlingar**
Nú ber til at útbúgva seg til fiskavirkara í Føroyum. Nýggja yrkisútbúgvingin tekur 3 ár. Á Fiskavirkinum eru tvey pláss til fólk, ið vilja hava hesa útbúgving.

**Umsóknir**
Umsóknir skulu vera sendar okkum áðrenn 11. apríl 2003.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Fyrispurnigar um størvini skulu stílast til Hartvig Joensen, virkisleiðara.

FISKAVIRKIÐ

Postrúm 29 · 510 Gøta · Tel 441002 · Fax 441766 · www.prg.fo

---

Havnar SJÚKRAKASSI

## Umboðsval

Sambært § 28 í høvuðssamtyktini verður lýst til val hósdagin 15. apríl 2003.

4 umboð í Tórshavnar valdømi, 1 umboð í Hests valdømi og 1 umboð í Kaldbaks valdømi eru upp á val.

Uppskot til umboð skulu skrivliga verða sjúkrakassanum í hendi ikki seinni enn 1. apríl 2003.

**Havnar Sjúkrakassi**

---

i
Sosialurin

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 3519
**Navn:** Sp/f Grevstur
**Adressa:** Torfinsgøta 6B, 100 Tórshavn
**Kommuna:** Tórshavnar Kommuna
**Stovningardato:** 30.01.2003
**Viðtøkudato:** 30.01.2003
**Kapitalur:** Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
**Stovnari:** Allan Gulak Jacobsen, Klaksvíksvegur 65, 700 Klaksvík.
**Stjórn:** Allan Gulak Jacobsen, Klaksvíksvegur 65, 700 Klaksvík.
**Tekningarreglur:** Felagið verður bundið við undirskrift av einum stjóra. **Grannskoðari:** Sp7f Agnar á Dul, Gerðagøta 31, 700 klaksvík.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 30.01.2003 - 31.12.2003
**Endamál:** Endamál felagsins er: Entreprenørvirkið v.m.

*Skráseting Føroya tann 17. mars 2003*

*Kristin Balle*

---

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Kunngerð

Sambært gr. 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir verður við hesum gjørt kunnugt, at Tórshavnar býráð á fundi 19. desember 2002 samtykti broytingar í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Ætlaða broytingin er, viðv. ásetingum fyri bilskúr og bilskýli í kap. IV, § 24 Greiningar og útrokning av nýtslustigum o.a. og §25 Viðvíkjandi hæddar- og frástøðuviðurskiftum húsanna.

Tilfar, sum lýsir broytingina, liggur frammi í Snarskivuni á Vaglinum frá mánadegi 17. mars til og við 7. apríl 2003. Upplatingartíðirnar hjá Snarskivuni eru mánadag til fríggjadag frá kl. 9.00 til kl. 16.00, hósdag tó til kl. 18.00.

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot skulu sendast Tórshavnar kommunu skrivliga í seinasta lagi 17. juni 2003.

SNARSKIVAN

Sosialurin -tað loysir seg

---



**Klaksvíkar Sjúkrahús**
FO-700 Klaksvík

## Sjúkrarøktarfrøðingar

### Deild A – kirurgisk seingjardeild

Søkt verður eftir avloysara fyri sjúkrarøktarfrøðing í barnsburðarfarloyvi frá 01.05.03 til 31.12.03. Arbeiðstíðin er 40 tímar pr. viku í skiftandi vaktum.

**Førleikakrøv:**
Prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
Fakligan áhuga innan kirurgiska sjúkrarøkt
Góð samstarvsevni
Ynskiligt er við royndum innan øki

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Sjúkrarøktarfrøðingafelag Føroya og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Onnu Løwe Sørensen, deildarleiðara telefon 455463 lokal 519 ella Jonu Nielsen, fyristøðukvinnu lokal 106.

### Deild M – Medicinsk seingjardeild

Søkt verður eftir avloysara fyri sjúkrarøktarfrøðing frá 01.05.03 til 30.04.04. Arbeiðstíðin er 32 tímar pr. viku í skiftandi vaktum.

**Førleikakrøv:**
Prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
Fakligan áhuga innan medicinska sjúkrarøkt
Góð samstarvsevni
Ynskiligt er við royndum innan øki

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Sjúkrarøktarfrøðingafelag Føroya og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Synnøvu Hansen, deildarleiðari telefon 455463 lokal 403 ella Jonu Nielsen, fyristøðukvinnu lokal 106.

Umsókn við avriti av prógvi, autorisatión og møguligum viðmælum skulu sendast til:

**Klaksvíkar Sjúkrahús**
Umsjónarmaðurin
FO-700 Klaksvík

---

## Hús í Klaksvík til sølu

Húsini á Stoksoyravegi 25 eru til sølu um hóskandi boð fæst.

**Tlf. 456741 og 268325**

---

Sosialurin
www.sosialurin.fo

---

## Bilførari

Vit søkja eftir bilførara/servicumanni at byrja skjótast tilber.

**Vit bjóða:**
- eitt spennandi og fjølbroytt starv í eini vinnu, sum er í vøkstri
- tryggar arbeiðsumstøður
- gott arbeiðsumhvørvi

**Arbeiði umfatar í høvuðsheitum:**
- avskipað og koyra vindeygu og hurðar út til kundan
- at taka mát og vegleiða kundan á staðnum
- servicera og smáar umvælingar

**Vit vænta av tær:**
- at tú ert fyrikomandi og álitandi
- at tú hevur royndir við timbur/snikkaraarbeiði
- at tú hevur koyrikort, evt. stóra koyrikortið
- at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt

**Løn:**
Løn verður sambært avtalu.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Heðin Poulsen tel. 33 21 77 ella 21 81 15

**Vatnsoyra** Snikkaravirki pf.
FO-385 Vatnsoyrar · Telefon 33 21 77 · Fax. 33 31 66
E-mail: vs-fg@h-window.fo · Homepage: www.h-window.fo

*Vatnsoyra Snikkaravirki pf. er móðurfelag hjá Føroya Gluggi pf. í Miðvági. Felagini hava felags skrivstovu/avgreiðslu. Vit framleiða vindeygu og hurðar úr timbur og plast og selja rundt alt landið. Í løtuni eru vit 24 starvsfólk, harav 2 montørar.*

---

## Pedagogur

Søkt verður eftir pedagogi til ein stovn við 30 børnum í aldrinum 3-7 ár. Starvið er 30 tímar um vikuna á einari stovu við 15 børnum. Starvið verður at seta sum skjótast.

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið. Starvið er lønt á lønarstigi 10-15.

Nærri upplýsingar um starvið og stovnin fáast við at venda sær til leiðaran.

Umsókn saman við avritum av prógvi og viðmælum verður at senda stovninum í seinasta lagi týsdagin 01. apríl 2003.

Um eingin pedagogur søkir starvið, verður hjálparfólk sett 25 tímar um vikuna í tíðaravmarkað starv.

**Barnagarðurin Vípan**
Vípuvegur 3
100 Tórshavn
Tlf. 31 75 35

---

## Bakaralærlingur

Okkum tørvar ein raskan bakaralærling. Hevur hetta tín áhuga so ring ella skriva til:

**Pf. Frants Restorff**
Tórsgøta 13 · Postsmoga 41
110 Tórshavn · Tlf. 311060

frants restorff

---

Søkt verður eftir

## LÆRLINGI Í SALTANGARÁ

**at byrja sum skjótast**

**Læran umfatar:** Samskifti við viðskiftafólk, sølu og annað fyrifallandi handilsarbeiði

**Vit vænta:** at tú ert sjálvstøðug/ur, arbeiðssom/samur, røkin, fyrikomandi og hevur hug og hegni til at veita kundum okkara eina góða tænastu.

Tað er ein treyt, at tú hevur FHS.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 21. mars 2003

Sendast til:

P/F Hjá Fróða
Yviri við Strond 3 · Postboks 1336 · FO-110 Tórshavn
tel 310808 · fax 314676 · frode@post.olivant.fo · www.hjafroda.fo

---

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Kunngerð

Sambært gr. 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir verður við hesum gjørt kunnugt, at Tórshavnar býráð á fundi 19. desember 2002 samtykti broytingar í serstøku byggisamtyktini nr. 3, Konmansmýra.

Ætlaða broytingin er, at eind A, stk. 2, pkt. d "*ikki er loyvt at byggja bilskúr á ognini*", verður broytt til "*bilhús kann byggjast á ognini sambært serligum treytum*".

Tilfar, sum lýsir broytingina, liggur frammi í Snarskivuni á Vaglinum frá mánadegi 17. mars til og við 7. apríl 2003. Upplatingartíðirnar hjá Snarskivuni eru mánadag til fríggjadag frá kl. 9.00 til kl. 16.00, hósdag tó til kl. 18.00.

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot skulu sendast Tórshavnar kommunu skrivliga í seinasta lagi 17. juni 2003.

SNARSKIVAN

---



## Lærlingur!

Um tær dámar væl klæðir, móta og litir

Um tú ert røkin, fryntligur og kann samstarva við onnur

Um tú ikki er bangin fyri at taka tøk

Um tú hevur lokið FHS ella HH prógv

– hava vit læruplássið til tín

Send eina umsókn innan 1. apríl 2003 til:

Seytjan
boks 127
110 Tórshavn